# Avloysari til Kaffibarrina á Vaglinum í Havn

**Dugni søkir eftir fólki, at avloysa tá á stendur og tá onnur eru í feriu, t.d í summar. Tað er neyðugt, at tú kann koma til arbeiðis við stuttari freist.**

Starvið er vælegnað til heimaarbeiðandi tilkomið fólk.

Kaffibarrin hevur opið vanligar dagar 10 – 18 og leygardag 10 – 14

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
- At selja serføroyskar hondgjørdar vørum
- At gera kaffi, te, smoothies við meira
- At reingera av og á

**Førleikakrøv:**
- Fyrikomandi og jalig
- Álítandi og røkin
- Tosa danskt
- Lætt við at seta teg inn í kaffiamboð og kassatól

**Løn:**
- Tímaløn

Starvið verður at seta skjótast gjørligt og áhugaði kunnu ringja til Ingibjørg Holm á tlf. 29 29 60

dugni

DUGNI@DUGNI.FO · WWW.DUGNI.FO

**ÓKEYPIS útkoyring í Tórshavn** FÓÐURSØLAN

## Kvalitetsfóður til kettur og hundar

Bílegg á telefon 50 20 22

SKYTTENs hunda- og kettufóður er framleitt síðan 1970 og inniheldur fisk og høsnarunga.



**Fóðurið inniheldur ikki...**
- haldevni
- aromaevni
- litevni
- sojaprotein

Hundafóður 20 kg SPECIAL bert 450,-

Kettufóður 15 kg KAT bert 390,-

Tel. 50 20 22 · info@fodursolan.com · www.fodursolan.com

Zarepta



# Lega fyri støk á Zarepta

Legan er fyri øll støk, 30 ár og eldri.
Legan byrjar fríggjakvøldið 13. mai kl. 19. og heldur fram til eftir døgurða sunnudagin 15. mai.

Evnið verður
Vel lívið!

Tilmelding fer fram við at ringja til Eydnu Berg, tlf. 219651 ella 319651

Les meira á www.zarepta.fo

Eysturkommuna

# Leiðari til dagstovnin Gjáa í Gøtu

Søkt verður eftir leiðara til dagstovnin Gjáa í Gøtu at byrja 01. juli 2011.
Leiðarin hevur ábyrgdina av tí aðalmáli, ið er sett fyri stovnin, og av tí námsfrøðiliga virkseminum, ið verður gjørt.
Leiðarin hevur, í samstarv við Eysturkommunu, tað fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina.
Starvið er 40 tímar um vikuna.
Um stovnin:

Í Gjáa arbeiða 4 námsfrøðingar og 9 hjálparfólk
Dagstovnurin Gjái lat upp 1. februar 2000. 52 børn eru á stovninum. Í dag eru 3 barnagarðsstovur, har børnini eru millum 2 og 5 ár.
Stovnurin liggur í barnavinarligum umhvørvi við Gøtugjógv.

**Førleikakrøv:**
- Námsfrøðiliga útbúgving og leiðsluroyndir

**Vit ynskja av tær:**
- at tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjøl-broyttan og tryggan gerandisdag
- at tú vilt vera við til at mynda og menna tað námsfrøðiliga umhvørvið

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m. a. dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast og fáa avbjóðingar í gerandisdegnum
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- at virða tað einstaka barnið
- at ferðast nógv í náttúruni

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 06. mai 2011.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Hansen, sosialdeildarleiðara, á telefon 73 00 14.

## Jørð í Kvívík til sølu

Matr. 40a 2 gl. Frammi í Haga, Kvívíkar bygd.

Innangarðs mat. 70 Kvívíkar bygd,
so sum matrikulin vísir.
(nógvur veltur bøur).

Uttangarðs 1 mørk í hagapartinum
Frammi í Haga, Kvívíkar bygd.
(felagshagi í alt 12 merkur = matr. 401a).

**Nærri við at ringja 21 97 26**



FØROYA PEDAGOG FELAG

# Starvsfólk til Føroya Pedagogfelag

Søkt verður eftir avloysara fyri starvsfólk í barsilsfarloyvi í fyribils eitt ár.

**Høvuðsuppgávur**
At taka lut í dagliga arbeiðinum í fakfelagnum.
Avgreiða dagligar sáttmála- og lønarspurningar.
Veita limum ráð og vegleiðing.
Aðrar fyrifallandi uppgávur.

**Førleikakrøv**
Fyrisitingarligar royndir.
Góðan telduførleika.
Kann verða ein fyrimunur, at viðkomandi hevur eftirútbúgving á fyrisitingarliga økinum og kunnleika til lógararbeiði ella hevur arbeitt við lógararbeiði.

**Lønar- og setanartreytir.**
Løn smb. avtalu.

**Arbeiðstíð**
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna – Møguleiki er fyri eitt sindur styttri arbeiðsviku.

**At byrja 1. juni 2011 ella eftir nærri avtalu.**

**Pedagogfelagið**
Vit eru eitt fakfelag í støðugum vøkstri. Vit umboða leiðarar, pedagogar og hjálparfólk, sum starvast innan sáttmálaøkið millum Fíggjarmálaráðið, Kommuna arbeiðsgevarafelagið og Føroya Pedagogfelag, t.e. starvsfólk sum starvast bæði hjá landi og kommunum.
Arbeiðið er sera spennandi, tí arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar.
Vit leita tí eftir fólki, ið kann taka hond í við øllum uppgávum í felagnum.
Tú verður partur av einum fyrisitingarligum toymi saman við forkvinnuni, fyrisitingarleiðara og bókhaldara.

**Umsóknin skal sendast til:**
**Føroya Pedagogfelag**
Tungugøta 1
100 Tórshavn
Tlf. 35 75 76
ella við telduposti til maud@pedagogfelag.fo

Umsóknin skal verða felagnum í hendi í seinasta lagi 1. mai 2011.

**Merkið brævbjálvan: Umsókn.**

# Frá Tórshavnar Bátafelag

Aðalfundurfundurin verður mikudagin 4. mai, kl 20,00 í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. Schrøtersgøta 9

Skrá sambært lógum felagsins

Uppskot, sum ynskjast viðgjørd, skulu verða nevndini í hendi í seinasta lagið 8 dagar undan fundinum

***Nevndin***